Jóhannis Joensen
løgtingsmaður

Nr. 52/2019

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um kommunala útjavningarskipan, settur landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at seta í verk kommunala útjavningarskipan?
2. Um so er, ætlar landsstýrismaðurin at skipa eina kommunala útjavningarskipan eftir serføroyskum viðurskiftum?
3. Heldur landsstýrismaðurin, at ávísar treytir eiga at fylgja við eini kommunalari útjavningarskipan?

Viðmerkingar

Umframt skattainntøkur, fíggja kommunurnar í Føroyum eisini virksemi sítt við partafelagsskatti og brúkaragjøldum. Tað er stórur munur á inntøkunum hjá kommununum pr. borgara. Partvís tí at skattaprosentið er ymiskt, men eisini tí at tað er munur á miðalinntøkunum hjá borgarunum kring landið, og hvussu nógvar fyritøkur eru í teimum ymisku økjunum. Við nýggjastu broytingunum í fiskivinnuni, verður fiskivinnan aftur savnað á heilt fáum hondum í fleiri ár frameftir. Fiskivinnan hevur seinastu árini givið stórt avkast í teimum økjum í landinum, har reiðaríini hoyra heima. Tí er stórur munur á økjunum, sum hava kvotur, og teimum, sum ikki hava kvotur hoyrandi til økið. Virðiságóðin fellur einamest til ávís økir í landinum, sum harvið kunnu gera størri íløgur og veita eitt hægri tænastustøði til borgarnar. Útgangstøðið eigur tó at sammetast í mun til sama inntøkuskattaprosent.

Tað er eisini ein sannroynd, at vit hava nakrar havnir, sum hava alla av- og áskiping í Føroyum. Trekkir ein íløgur og rakstur frá av- og áskiping í hesum havnum, liggur nógvur peningur eftir. Peningurin kemur einamest hesum kommununum tilgóðar.

At tað er munur á, hvussu økini í landinum eru fyri fíggjarliga, er ein sannroynd. Hetta er eisini komið til sjóndar í sambandi við, at eldraøkið bleiv lagt út til kommunurnar. Meðan summar kommunur ella kommunueindir megnaðu at lofta uppgávuni, hava aðrar havt tørv á serskipanum fyri at fáa viðurskiftini at hanga saman fíggjarliga.

Heldur enn at gera fleiri ósamanhangandi serskipanir fyri ymisk økir í landinum, kann tað vera skilagott at seta í verk eina kommunala útjavningarskipan. Soleiðis vildu vit til eina og hvørja tíð tryggjað okkum, at einki øki í landinum dragnar afturúr í menningini, og at virðini verða býtt javnari millum fólkið. Bý- og bygdarráð vilja tó sita við raðfestingarrættinum í økjunum.

Øll hini Norðurlondini hava kommunalar útjavningarskipanir, og tí kann tað vera vert at hyggja at, hvussu hesi skipa seg. Kortini kann vera skilagott at hava serføroysku viðurskiftini í huga, skal ein kommunal útjavningarskipan skipast her á landi.

Á Løgtingi, 10. februar 2020

Jóhannis Joensen